Venjaraskiftið gav úrslit:

## Gongdin vend

**Síðan VB fekk nýggjan venjara er vandakósin vend**

VENJARASKIFTI

*Stefan í Skorini*

*stefan@sosialurin.fo*

Fyrsti venjarin at fáa sekkin í ár var danin John Christensen hjá VB. Eftir at VB hátíðarhelt 100 ára dagin á aftasta plássi í Formula deildini, er vend loksins komin í hjá vágbingum. Av teimum seks dystunum, har nýggi venjarin hevur staðið við róðrið hevur VB vunnið tríggjar, spælt ein javnan og tapt tveir dystir. Tískil kunnu vit staðfesta, at liðið hevur vent gongdini undan summarsteðginum, eftir at vandi var fyri, at vágbingar blivu isoleraðir á aftasta plássi.

- Vit hava ligið og tvassa niðri í botninum, so vit skulu bara vinna, tí at javnleikur telur so at siga einki, segði málverjin Bjarni Johansen eftir dystin. Hann er sannførdur um, at liðið als ikki er so vánaligt, sum stigatalvan vísti fyrsta part av kappingarárinum.

Hann heldur, at tað eftir øllum at døma hevur hjálpt at skifta venjaran út. Leikarar hava víst ein nýggjan hugburð og eru farnir at trúgva meira uppá egnan mátt og megi.

## Símun Samuelsen til Íslands

ROYNDARVENJING

*Stefan í Skorini*

*stefan@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá VB upplýsir sunnukvøldið, at ungi og evnaríki vágbingurin skal til royndarvenjing í íslendska felagnum Keflavík.

Símun hevur staðið seg væl seinastu dystirnar, og sunnudagin fekk hann tvey mál ímóti TB. Fyri VB verður tað ein dyggur smeitur at missa Símun, men enn er so einki komið uppá pláss viðvíkjandi einum møguligum sáttmála millum Símum og Keflavík.



*VB-leikarar fegnast um stórsigurin á grannunum fyri norðan Mynd: Leivur Nygaard*

VB-TB 5-1 (3-0):

# VB stevnir uppeftir

**Eftir trivaliga sigurin á grannunum fyri norðan hevur VB lagt eina fjarstøðu niður til botnliðini. TB hevur innanfyri fýra dagar tapt tvær týðandi botnuppgerðir**

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

*stefan@sosialurin.fo*

VB lat ongantíð nakran iva vera um, hvat besta liðið í Suðuroynni er í løtuni. Við einum 5-1 sigri eru vágbingar eisini farnir at draga frá hinum liðunum í botnstríðnum.

### Trý skjót mál

Fyrsta hálva tíman av dystinum á Eiðinum sunnudagin leikaði javnt á. Bæði liðini høvdu hálvar møguleikar, men veruliga vandamikið gjørdist tað tó ongantíð.

Eftir hálvan tíma fær VB hornaspark, og verjuleikarin Anders Sørensen er hægstur og høvdar bóltin í netið til 1-0.

Hetta tók pippið frá tvøramonnum, og teir mistu fullkomiliga tamarhaldið á dystinum. Símun Samuelsen fekk tvey mál innanfyri stutta tíð, og so var 3-0 til VB.

Bæði málini vóru rættiliga lík. VB fangaði bóltin á TB-hálvuni, og so var Símun sendur skjótt avstað, og dagsins maður hjá VB var ósvitaliga tryggur, tá hann fekk møguleikan. Nú er Símun farin til Íslands at royndarvenja við Keflavík, og tað verður ein stórur smeitur fyri VB, um tann ungi áleyparin endar íslendsku deildini.

### VB bindur um

TB gjørdi hóast alt eina roynd at svara aftur, og teir høvdu ein møguleika at minka til 3-1 heilt tíðliga í seinna hálvleiki, men Bjarni í VB-málinum bjargaði í tí støðuni.

Hóast VB var frammanfyri við trimum málum var neyðugt at binda um heilan fingur fyri ikki at missa kalvan á stokkinum.

Fyrst økti Dan Djurhuus til 4-0, áðrenn Milan Kulic fekk tað fimta málið, og so var dysturin í roynd og veru liðugur.

Jón Johannesen fekk minkað um munin við einum sera vøkrum máli, men tað mundi vera lítil troyst hjá tvøramonnum, sum fóru norðaftur við enn einum lemjandi tapi. Hetta er triðju ferð í ár, at TB letur fimm ella fleiri mál fara ígjøgnum.

Móti endanum av dystinum fekk Aca Petrovic beinleiðis reytt kort. Hann sendi ein alboga í høvdið á Súna úr Hørg, og dómarin bar eyga við hendingina, og so var eingin náði víst.

Fyrra dystin millum VB og TB, vunnu tvøramenn 1-0 við máli, sum Larby skoraði. Hetta var sostatt eitt gott høvi hjá vágbingum at siga takk fyri síðst.

### TB í trupulleikum

Eftir at TB eitt skifti lá miðskeiðis á stigatalvuni er aldursforsetin aftur farin at dragna í botninum. TB hevur bert fingið tvey stig seinastu átta dystirnar, og tað burdi fingið alarmin í gongd á Tvøroyri.

TB kann tó ugga seg við, at liðið hevur sjey heimadystir av teimum seinastu tíggju dystunum, ið standa fyri framman. TB hevur staðið seg væl á heimavølli, og tað kann vera bjargingin hjá TB í fremstu deildini.

Tveir teir næstu dystirnir eftir steðgin vera júst ímóti ÍF og KÍ, ið eru argastu kappingarneytarnir í botninum á deildini. Hesir dystirnir fara sjálvsagt at hava alstóran týdning í niðurflytingarstríðnum.

Hjá VB peikar pílurin hinvegin uppeftir, og teir hava staðið seg væl síðan nýggi venjarin tók við.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-TB 5-1 (3-0):**

1-0: Anders Sørensen
2-0: Símun Samuelsen
3-0: Símun Samuelsen
4-0: Dan Djurhuus
5-0: Milan Kulic

**VB:** Bjarni Johansen - Jákup Olsen (Dánjal Johan Joensen), Anders Sørensen, Súni úr Hørg - Símun Samuelsen, Edvard Ble, Pól Poulsen (Jón Kárason Poulsen), Dan Djurhuus (Palli Augustinussen) - Milan Kulic - Nenad Zivanovic

**TB:** Predrag Markovic - Predrag Ziskovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Alex Jovevic, Bárður Dimon (Birgir Rasmussen), Einar Petersen, Búi Mortensen (Hallur Christiansen) - Emanuel Larby (Olivur Abrahamsen), Dan Mortensen

**Reytt kort:** Aca Petrovic